# Kattakongur úr Avstralia



*Eini 600 fólk vóru til tunnuslátturin leygardagin í KÍ høllini*



*Tíggju kattakongar fingu gullheiðursmerki og ein stóran pakka av bomm*

**Ein av kattakongunum, sum varð kosin í KÍ høllini leygardagin, var avstraliudrongurin Nick, sum er komin til Klaksvíkar sum skiftisnæmingur. Umleið 600 fólk vóru til árliga tiltakið hjá Klaksvíkar Hornorkestri**

TUNNUSLÁTTUR
*Orð: Solby A. Eliasen*
*Myndir: Kl. Hornorkestur*

**Klaksvík:**
Tíggju tunnur hingu uppi inni í høllini, og børnini vórðu býtt upp eftir skúlaaldri. Tað vil siga, at ein tunna var til tey undir skúlaaldur, tvær vóru til fyrsta flokk og síðani ein til hvønn flokkin upp til áttanda. Og so var ein tunna til framhaldsdeildina, sum var rímuliga væl umboðað til tunnuslátturin henda dagin. Kattakongurin hjá framhaldsdeildini var ein drongur, sum er komin úr Avstralia sum skiftisnæmingur. Hann kom til Føroya mánadagin í seinastu viku og gongur í Tekniska skúla. Hann fegnaðist um heiðurin at gerast kattakongur hjá teimum elstu børnunum.

Onkur av teimum undanfarnu árunum, hevur ongin næmingur í framhaldsdeildini verið at sligið, so tá hava páparnir tikið sær av tí tunnuni.

Níggju onnur børn vórðu eisini kosin kattakongar henda dagin, og sum vinning fingu tey gullheiðursmerki og ein stóran posa av bomm. Øll børnini fingu annars ein pakka av bomm í part fyri teirra luttøku í tiltakinum. Tey vaksnu hugnaðu sær við einum kaffimunni, meðan børnini slóu tunnurnar. Eisini var eitt risastórt køkutombola, har yvir 400 vinningar vóru. Vinningarnir vórðu latnir av ymsum stuðlum, umframt, at limir í hornorkestrinum høvdu latið teirra part.

Tíðin er farin frá at bomm verður fylt í tunnurnar, tí royndir hava eisini víst, at tað verður alt ov rokaligt tá eini 4-500 børn tveita seg eftir bommunum, tá tunnan er farin í gólvið.

Tað gekk ikki meira enn góður hálvur annar tími, so vórðu allar tunnurnar í gólvinum. Síðani varð vakrasta grýlan funnin, og mynd tikin av øllum kattakongunum. Og eitt avbera væleydnað tiltak var komið at enda. Onkur hevði tó hug at fílast á, at tað bert var tann eina tunnan til børn undir skúlaaldur. Tað er ein breiður aldursbólkur, og eisini er tað stórur munur á, hvat eitt trý ára gamalt barn megnar og so eitt sum er seks ella sjey. So ta einu løtuna beint eftir, at slátturin var byrjaður, var sera ilt at fáa eyga á hvar røðin hjá teimum børnunum var. Men tað lagaði seg sjálvt eftir eina løtu, tí fleiri av teimum smæstu sláa bara ta einu ferðina, og so letur tað til, at tey ikki tíma meira.

Frá Hornorkestrinum verður sagt, at tey lata væl at undirtøkuni fyri tiltakinum, og hevur hon verið jøvn tey seinnu árini.



*Henda fitta gentan varð iklødd sum ein álvafljóð*




*Henda fitta grýlan varð kosin at vera tann vakrasta í høllini leygardagin*



*Grýlurnar vóru nógvar í tali og sera ymiskar. Tað var stuttligt at síggja, hvussu nógv fleiri høvdu gjørt burturúr*



# Kunningarleiðarin í Vágum byrjaður

**Nýggi kunningaleiðarin í Vágum hevði sín fyrsta arbeiðsdag mánadagin. Fyrsta takið verður at læra oynna at kenna, sigur hann**

KUNNING
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Nýggi leiðarin á Kunningarstovunik í Miðvági, Terji Nielsen, hevði sín fyrsta arbeiðsdag mánadagin.

Nýggi leiðarin er settur í starv av Felagnum Vágar og skal vera leiðari á Kunningarstovuni í Vágum. Kunningarstovan er samtak millum øll vinnufeløg, her undir ferðavinnuna, í oynni, sum eru skipað í Felagið Vágar.

Terji Nielsen er 31 ára gamal og ættaður úr Havn. Hann hevur fortíð í ferðavinnuni, har hann hevur arbeitt í eini trý á hjá Smyril Line. Millum annað á incoming deildini hjá felagnum. Hann er útbúgvin lærari, og hevur seinastu tíðina arbeitt sum lærari í Danmark.

Terji Nielsen, sigur við Sosialin, at hann nú fyrst av øllum má læra oynna at kenna, áðrenn hann kann fara undir at selja hana. Tí tað er tað, hann skal.

Ein av uppgávunum hjá nýggja kuningarleiðaranum verður at samskipa tiltøk av ymsum slagi, sum vera í Vágum. Tað verið seg bæði fyri ferðavinnu og handilslív. Ítróttarfeløg og hvat nú vera kann, sigur Terji Nielsen

Kunningarstovan hevur higartil hildið til í Kommunuhúsinum í Miðvági, og tað verður eisini her, Terji Nielsen fer at starvast fyrstu tíðina. Tí arbeitt verður við ætlanum um at flyta. Miðvágs Kommuna hevur sjálv brúk fyri hølun um, og eisini verður hildið, at tað er í so trongligt, har Kunningarstovan nú heldur til.

Væntandi verður avgjørt í hesi vikuni, hvar nýggju hølini hjá Kunningarstovuni vera.



*Onkur postur lá fyri nýggja kunningarleiðarnum, tá hann møtti til arbeiðis mánamorgunin*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Prix-bólkar inn á hitlistan



*Guðrun S. Jacobsen er aftur hesa vikuna framman fyri russisku genturnar í TATU á okkara hittlista, 15 tær bestu*

**Guðrun Sólja Jacobsen er framvegis ovast á 15 teimum bestu, har bólkarnir Mind's Eye, Crashwave og Flux nú eru komnir upp í part við live-upptøkum Prixnum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Guðrun S. Jacobsen heldur seg aftur hesa vikuna framman fyri tær russisku genturnar í TATU, tá ið tað snýr seg um best umtókta sangin í landinum. Framførslan av Promise Me hevur rættiliga hugtikið føroyingar, og eisini tey ungu eru fallin fyri sanginum.

Rockbólkurin Mind's Eye streyk leygarkvøldið inn á 15 tær bestu við sanginum Know my name, sum er ein live-upptøka frá innleiðandi umfarinum í Prixnum. Bólkurin er nú nummar 9 á listanum, og er hástøkk hesa vikuna.

## Aðrir royna seg

Eisini Flux og Crashwave komu inn á listanum við sangum frá Prixnum. Skizo hjá Crashwaev er nummar 12, og Ticket for life hjá Flux er nummar 13 á listanum hesa vikuna.

Umframt hesar sangir er Skótin á Bø eisini á 15 teimum bestu, hesa vikuna er hann nummar 11.

Tríggir aðrir Prix-bólkar hava ein eykasang við á hitlistanum hjá Útvarpinum hesa vikuna. Talan er um S.C.A.T.G.O.H, onkikanndiskuterast.alt kann og Side Effect.

# Erland skal verja Ph.D. ritgerð

**Erland Viberg Joensen, cand. mag. skal verja Ph. D. ritgerð um Lossingarmenn í Havn fríggjadagin**

PHD RITGERÐ
*Tíðindaskriv*

Fríggjadagin 21. mars 2003 fer Erland Viberg Joensen, cand. mag. at verja Ph.D.-ritgerðina »Lossingarmenn í Havn« við Fróðskaparsetur Føroya.

Í dómsnevndini hava sitið Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri, Ph.D., Jonathan Wylie, professari, Ph.D., við Massachusetts Institute of Technology og Elisabeth Vestergaard, granskingarleiðari, Ph.D., við European Science Foundation í Strasbourg.

Sjálv verjan, sum er almenn, fer fram í høllini á Føroya Sjómansskúla. Byrjað verður klokkan 13.00.

Ritgerðin "Lossingarmenn í Havn" liggur alment frammi á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum frá fríggjadegnum 28. februar 2003. Hon verður eisini at fáa til keyps í bókabúðunum í næstum. Føroya Fróðskaparfelag gevur bókina út sum Supplementum nummar XXXVII til Fróðskaparrit. Bókin fer at kosta 280,- krónur.

SKEIÐ Í DEKORATIÓN



Samskifti
Tel. 422 900
e-mail: samskifti@samskifti.fo
Postboks 133 - 110 Tórshavn
www.samskifti.fo

Skeiðið er ætlað øllum áhugaðum.

Endamálið við skeiðinum er at geva luttakaranum grundleggjandi innlit í at seta saman vørur, litir og ljós.

*Innihald*
Skeiðið viðgerð í høvuðsheitinum hesi evni:

*Uppseting *Linjur *Samanseting *Brennidepil *Tað gylta snittið *Symmetri *Asymmetri *NCS litsirkul- og trýkant *Psykologiskir virkningar *Skuggaspæl *Effektljós *Ymisk sløg av ljósi v.m.

Skeiðið er leygardag og sunnudag 8 og 9 mars 2003 í Læraraskúlan, Tórshavn
Skeiðið endar við einari eftirmetan og einum skreytblaði.
Kostnaður kr. 2.900,-

Meira fæst at vita við at vitja heimasíðu okkara www.samskifti.fo

*Seinasta freist at tekna seg er mikudagin 5. mars á samskifti@samskifti.fo ella á tlf. 422 900*